## Íslendingar skifta trúgv

2.876 íslendingar ella ein av hvørjum hundrað skiftu trúarsamfelag í fjør. Tað vísa tøl hjá íslendsku hagstovuni, og tey vísa eisini, at altsamt fleiri íslendingar velja at skifta trúarsamfelag. Størsta einstaka missin hevði tjóðkirkjan, og í fjør misti kirkjan 1.484 fleiri limir, enn hon fekk. Størstu tilgongdina hevði katólska kirkjan, sum fekk 525 limir afturat. Nógvir íslendingar skráseta seg eisini sum trúloysingar, og tað valdu 685 at gera í fjør.

## Kvinnur skjóta reinsdjór

Ongantíð áður hava so nógvar kivinnur søkt um at sleppa at skjóta reinsdjór í Íslandi sum í ár. Tey, sum umsita veiðiloyvini, siga, at næstan 100 kvinnur søktu hesaferð, og av teimum fingu 47 loyvi at skjóta reinsdjór. Bæði tølini eru nýggj met, skrivar Morgunblaðið. Í fjør søktu umleið 60 kvinnur, og tá fingu 28 veiðiloyvi. Í Íslandi er loyvt at skjóta reinsdjór í tíðarskeiðinum frá 1. august til 15. septembur. 1.333 djór kunnu veiðast.

# ur í heyst



í nærmastu framtíð.

- Mær vitandi er eingin nýggjur sáttmáli komin undir land.

Dánjal sigur tó, at skipasmiðjan uppá fyrispurning hevur gjørt eitt tilboð upp á ein nýbygning aftrat.

- Nevnt varð í matarhøllini leygardagin, at felagið, sum hevur í hyggju at smíða eitt skip aftrat, hevur keypt skrúvu. Enn er tó ov tíðliga at siga, um nýggjur sáttmáli spyrst burtur úr, leggur hann aftrat.

### Nýggj beding

Arbeiðið við at byggja nýggja beding á Skála Skipasmiðju gongur sína gongd. Hetta er eitt stórarbeiði, sum væntandi kemur at kosta einar 30 miljónir krónur tilsamans. Nýggi vognurin er komin, og ætlandi verður nýggja bedingin liðug í august.

- Sjálvur vognurin er bygdur í Frederikshavn, men verður settur saman her hjá okkum, sigur Dánjal Andreassen.

Tað er felagið J&K Petersen, sum stendur fyri bedingsarbeiðnum – á sjógvi og landi, men felagið hevur eisini undirveitarar til partar av verkætlanini.





*Um hálvan mars hevur Demich tríggjar deildir – eina í Stiðjagøtu í Havn, eina á Marknoyri í Vági, og tá letur nýggj deild eisini upp í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Demich í Saltangará

**Um hálvan mars ella so fer fyritøkan Demich at lata upp handil, verkstað og goymslu í Saltangará, og tá er eisini ætlanin, at felagið kemur við nýggjari og dagførdari heimasíðu**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Demich er ein fyritøka, sum veitir allar tænastur innan hita, ventilatión og sanitet. Í næstum fer felagið av álvara at bjóða seg fram á Skálafjørðinum við handli, verkstaði og goymslu.

Um hálvan mars letir Demich soleiðis upp í hølunum, har Rúsan í Saltangará var áður. Hetta er bygningurin, sum er kendur undir navninum Stokkastovan.

Sosialurin hevur skilt, at Demich í sambandi við upplatingina í Saltangará eisini fer at bjóða fram eina nýggja og dagførda heimasíðu.

### Demich-søgan

Tað var hin 27. januar í 1960, at Fa. Demich varð stovnað, og hin 17. februar í 1971 varð felagið umskipað til partafelag. Um hetta mundið helt felagið til á Tinghúsvegnum í Havn.

Stovnararnir av fyritøkuni vóru Johannes C. Michelsen (Lill) og Óli F. Debess, sum ávikavist vóru stjóri og blikksmiðjur. Tað er haðani, at navnið Demich kemur - DE fyri Debess og MICH fyri Michelsen.

Hin 10. november í 1982 keyptu verkfrøðingarnir, Simon Hansen og Trygvi F. Guttesen, felagið.

### Nýbygging

Í 1987 flutti Demich í nýggjan bygning í Stiðjagøtu í Havn, har fyritøkan bæði hevur handilshøli, verkstað og goymslu.

Í 1994 teknaðu Torbjørn Hansen, Bjarne Hansen og Olav Guttesen partapening í felagið og komu soleiðis í nevndina.

Í 2001 fór Simon Hansen frá sum stjóri, og í hansara stað vart Torbjørn Hansen settur.

Umframt handil, verkstað og goymslu í Stiðjagøtu, heldur Demich eisini til í Vági – og nú verður so um hálvan mars latið upp í Saltangará.

# Prát um livratøku

Í Sosialinum í morgin fara vit at práta við Mortan Johannesen, Mortan hjá Andriasi, um nógv umrødda málið í seinastuni – livratøku.

Mortan, sum hevur verið fiskimaður at kalla alt sítt lív, hevur hug at gera viðmerkingar til ymiskt av tí, sum granskarin, Hóraldur Joensen, hevur ført fram um livir og livratøku.

Hóraldur heldur, at føroyska samfelagið missir einar 2 miljardir krónur um árið, tí innvølur á fiski í stóran mun fer út ígjøgnum lensiportrini á skipi.

(-vilmund)



*Í blaðnum í morgin ger Mortan Johannesen viðmerkingar til livratøku*

*Mynd: Jan Muller*